VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Samskipari hjá fiskivinnuni á landi

Av tí at starvsfólk okkara ferð í annað starv søkir Føroya Arbeiðsgevarafelag eftir einum ráðgeva til skrivstovuna í Vinnuhúsinum.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um málsviðgerð fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag, ið røkir áhugamálini hjá føroysku fiskavirkjunum. Viðkomandi kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við stjóran í Vinnuhúsinum og við nevndina í Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Arbeiðið fevnir m.a. um:
- Kanningar av felags viðurskiftum hjá limunum
- Vinnuumboðan í sambandi við myndugleikakrøv
- Útflutningsviðurskifti
- Samband við útlendska fiskivinnu og seljarar
- Málsviðgerð / skrivarauppgávur fyri nevndina í Ráfiskakeyparafelagnum

Vit vænta, at tú:
- hevur hóskandi útbúgving og hollar arbeiðsroyndir, serliga innan fiskivinnuøkið
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevnir
- dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum.
- hevur hollan telduførleika á brúkarastøði (Windows Office forrit)

Vit kunnu lova tær eitt fjølbroytt, áhugavert og krevjandi starv.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn, merkt "Starv", eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 22. juni 2001.
Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til Jan Mortensen, tlf. 31 18 64.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vinnuhúsið
Postsmoga 179
110 Tórshavn

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 13 vinnufeløgum og í løtuni starvast 6 fólk í umsitingini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møgulig kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og politiskari ávirkan. Feløgini taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

STARV sosialurin

Fólk søkist

til Tíðindablaðið Sosialin, marknaðardeildin

Vit sóknast eftir einum fólki at taka sær av dagliga arbeiðinum við sølu av lýsingum og øðrum fyrifallandi uppgávum.
Herundir er ein uppgáva at verða við til at menna og reka Internet Sosialin.

Tú:
- Ert ágrytin
- Dugir væl at tosa í telefon
- Hevur lætt at tosa við fólk
- Hevur áhuga fyri telduarbeiði
- Ert før/ur fyri at arbeiða undir tíðartrýsti
- Hevur hugflog og dugir at festa tað á pappír
- Dugir væl føroyskt
- Kanst byrja skjótast gjørligt

Vit kunnu bjóða:
- eitt spennandi og mennandi starv, har tú gerst partur av eini vælvirkandi marknaðardeild
- Samskifti innan- og uttanlands við viðskiftafólk okkara
- Áhugaverdar og fjølbroyttar uppgávur

Umsóknarfreistin er 25. juni 2001.
Løn samb. avtalu.
Umsóknin skal saman við viðkomandi skjølum sendast til:

Sosialurin
P.O. Box 76
110 Tórshavn
Att.: Marjun Dalsgaard

Tú ert vælkomin at ringja tel. 311820 at hoyra meira um starvið.
Spyr eftir Marjun ella send ein e-mail til:
marjun@sosialurin.fo

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Her starvast í dag uml. 25 fólk.

NSÍ Venjingartíðir hjá NSÍ

Klokkan	Mánadagur	Týsdagur	Mikudagur	Hósdagur	Fríggjadagur
15.00	Undir skulaaldri	Pinkur	Gentur 12-14 ár	Pinkur	Gentur 10-12 ár
15.30	Undir skulaaldri	Pinkur	Gentur 12-14 ár	Pinkur	Gentur 10-12 ár
16.00	Gentur 12-14 ár	Smápiltar	Gentur 10-12 ár	Smápiltar	
16.30	Gentur 12-14 ár	Smápiltar	Gentur 10-12 ár	Smápiltar	
17.00	Smádreingir				
17.30	Smádreingir	Piltar	Dreingir	Smádreingir	Piltar
18.00		Piltar	Dreingir	Smádreingir	Piltar
18.30		Piltar	Dreingir	Smádreingir	Piltar
19.00		1. & 2. deild	2. deild & unglingar	1. & 2. deild	1. & 2. deild
19.30		1. & 2. deild	2. deild & unglingar	1. & 2. deild	1. & 2. deild
20.00		1. & 2. deild	2. deild & unglingar	1. & 2. deild	1. & 2. deild
20.30					
21.00		Dreingir	5. deild	Dreingir & 4. deild	
21.30		Dreingir	5. deild	Dreingir & 4. deild	
22.00		Dreingir	5. deild	Dreingir & 4. deild	

Í samband við venjingina hjá børnum undir skúlaaldur verða foreldur ella avvarandi biðin at vera hjástødd

Klaksvíkar Sjómansskúli

e n rk n k

Í august 2001 byrja hesi skeið:

HEIMASKIPARAR:
Útbúgvingin til heimaskipara varðar í 1ár. Upptøkutreytir til heimaskiparar er treytað av víðkaðari fráfaringarroynd fólkaskúlans í lærugreinunum føroyskt, danskt, enskt, rokning/støddfrøði, alis-evnafrøði við próvtali í minsta lagi 6 ella javnmett hægri prógv. Ella hevur gingið á sjóvinnuskúla og staðið dugnaskaparskeið í sigling.
Kravda siglingartíð til heimaskipara er 12 mánaðar, herav skulu 6 mánaðar við fiskiskipi yvir 20 t.

Við framhaldandi lestur í 1/2 ár afturat kann takast prógv sum skipari.

SJÓVINNUFLOKKUR:
Við hesum skeiði fæst atgongd til framhaldandi lestur til heimaskipara, um tygum eisini hava ta neyðugu siglingartíðina. Nærri upplýsingar hesum viðvíkjandi fáast við at venda sær til skúlan.

Møguleiki verður eisini at taka dugnaskaparskeið í sigling, ið gevur rætt til at føra skip upp til 100 tons út á 30 fjórðingar úr landi.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varar 20 vikur. Tað eru ongar upptøkutreytir til at sleppa inn í sjóvinnuflokkin. Fyri teir, sum seinni ætla sær til heimaskipara og víðari, er tað ein stórur fyrimunur at hava gingið í sjóvinnuflokkinum áðrenn, tí her verður grundarlagið til fleiri týðandi lærugreinirnar lagt.

SKIPSKOKKASKEIÐ:
Útbúgvingin gevur øktan førleika at virka sum skipskokkur á føroyskum fiskiskipi.

Kokkaútbúgvingin leggur m.a. dent á, at næmingar læra føðslulæru og einføri, at proviantera, matgera, baka og borðreiða.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varar í 20 vikur. Skeiðið, ið byrjar í august 2001, er fullteknað.

Nýtt skeið byrjar aftur í januar 2002.

Seinasta freist at tekna seg til hesi skeið er 12. juni 2001.

i
Sosialurin

Fuglafjarðar skúli

Søkt verður eftir lærarum til skúlaárið 2001/2002.

- **2 størv** 26,5 tímar fyri læraran í farloyvi
- **2 størv** 26,5 tímar fyri lærarar, ið hava niðursett tímatal
- **1 starv** 6 tímar at undirvísa í motorlæru

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2001/2002, verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 444087.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi **mikudagin 20. juni kl. 16.00.**

e r a r

Fuglafjarðar skúlanevnd
v/ Terja á Lakjuni
FO-530 Fuglafjørður

Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

Vegna ov fáar umsóknir verður starvið lýst leyst av nýggjum

Almanna- og heilsumálastýrið søkir starvsfólk til barnaansingarøkið

Í sambandi við at nýggj dagstovnalóg varð sett í gildið tann 1. juli 2000, verður við hesum søkt eftir einum fólki at taka sær av yvirskipaða eftirlitinum, og ráðgeva kommunum, ið umsita dagstovnar og dagrøktir sambært dagstovnalógina. Starvið verður at seta 1. september 2001 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum:
- at áseta reglur og hava eftirlit við, at kommunurnar umsita lógina um dagstovnar og dagrøktir sambært nýggju dagstovnalógini
- at veita kommununum ráðgeving og vegleiðing í øllum umsitingarligum fyriskipanunum, ið verða ásettar.
- at veita kommununum fakliga ráðgeving.

Førleikakrøv:
- námsfrøðiliga- ella líknandi útbúgving
- umsitingarligar royndir
- kunnleika til EDV
- evni at samstarva og samskipa.
- vitan um tær treytir sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting

Við bjóða:
- Sjálvstøðugt starv við fjølbroyttum uppgávum sum til tíðir er strævið, men eisini áhugavert
- Flex- tíð
- Skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar.

Løn- og setanartreytir:
- starvið hevur tilvísing til deildarstjóran á Fyrisitingardeildini
- starvið skal setast skjótast tilber
- løn sambært avvtalu ímillum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag
- setanarøkið er Almanna- og heilsumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt hini aðalstýrini og Løgmannsskrivstovuna.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Súsonnu Nolsøe, fulltrúa á tlf. 304050.

Umsókn:
Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Almanna- og heilsumálastýrinum í hendi **í seinasta lagi 18. juni 2001 kl. 14.00** og skal sendast til:

Almanna- og heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Eykafloksting

Tjóðveldisflokkurin hevur eykafloksting 16. juni kl. 10.00 í Læraraskúlahøllini í Tórshavn.

Til viðgerðar verða m.a. uppskot til stevnumið.

Limir í flokkinum kunnu fáa eitt eintak av uppskotinum við at venda sær til floksskrivstovuna á tlf. 312200 ella við at senda e-post á: loysing@post.olivant.fo

Tjóðveldisflokkurin